## Leivur um Áslu

Burtursæð frá sinninum er so nógv gott at siga um Áslu. Hon er alt tað, sum eg ikki eri. Hon fylgir við í øllum og veit í høvdinum hvat stendur á hvørjari konto hjá okkum. Eg biði hana ofta slappa eitt sindur av, men tað er eisini deiligt, at hon hevur skil á, tí so sleppi eg frá og kann gera tað, sum mær dámar best. Uttan hana hevði tað ongantíð gingið.



## Ásla um Leivur

Hann er ótrúliga tolin og dámar at hjálpa fólki. Tað hevur ikki so stóran týdning fyri hann, um hann fær nakað afturfyri. Hann elskar at arbeiða. Um tað so er klokkan trý um náttina, so er hann akkurat líka blíður. Eg havi ongantíð hoyrt hann siga eitt øvugt orð um nakað viðskiftafólk. Hann hevur æruna, at tað hevur gingið so væl.

# Viljin røkkur langt



**- Eg hevði aldri trúð, at vit kundu arbeiða saman. Men tá vit stóðu í skuld upp um bæði oyru og vóru líka við at missa húsini, so høvdu vit onki val, sigur Ásla Fonn, sum saman við manninum Leivur Fonn byrjaði at selja ferðaseðlar, tá ið ringast stóð til í Føroyum í 90'unum. Tey stríddu seg við sterkum vilja og hørðum arbeiði burtur úr kreppuni og hava í dag landsins størstu sjálvstøðugu ferðaskrivstovu**

## Samrøða

**Dorit Hansen**
dorit@sosialurin.fo

Føroya størsta ferðaskrivstova er ikki at finna á stórum altjóða messum ella í ágangandi lýsingarherferðum, og stjórin í fyritøkuni er ikki dagligur gestur á bonaðu gólvunum í Havn ella á vinnusíðunum í føroysku fjølmiðlunum.

Fyritøkan Fonn Flog er í allari stillheit voksin frá einari lítlari kjallarafyritøku til í dag at hava 13 starvsfólk við deildum í bæði Klaksvík og Runavík. Bestu reklamurnar hava verið nøgd viðskiftafólk, og fyritøkan hevur ongantíð søkt eftir starvsfólki.

Parið aftanfyri Fonn Flog eru Ásla og Leivur Fonn. Søgan um Fonn Flog er ikki ein ljósareyð søga um lættan vinning og stórt marglæti. Søgan um Áslu og Leivur er um hvussu eitt føroyskt par við sterkum vilja og hørðum arbeiði bardi seg burtur úr kreppuni fyrst í 90'unum.

Tann triða august 1992 seldu Ásla og Leivur fyrsta ferðaseðilin. Hetta var mitt í ringastu krepputíð. Leivur hevði havt heilsølu og handil í fleiri ár, men kreppan stegðaði allari sølu. Fyritøkan var um at fara á húsagang, og mistu tey fyritøkuna, mistu tey eisini hús og heim.

Tað var næstan av tilvild at ferðaseðlasølan byrjaði. Mamma Áslu, Gigga við Keldu, skuldi saman við vinkonu síni, Mariu Laksafoss, fara ein túr til Danmarkar hetta summarið. Dóttir Mariu visti, at bíligir ferðaseðlar kundu keypast í donsku ferðaskrivstovuni Unitas Rejser. Leivur ger ikki mætari enn at ringja til Unitas Rejser og spyr stjóran, Knud Erik Bjerre, um hann er áhugaður í einum samstarvi.

### Byrjaðu í blindum

- Eg kendi als onki til ferðavinnuna. Eg dugdi at keypa og selja, og óvitandi sum vit vóru, hildu vit, at ferðaseðlar vóru sum aðrar vørur. Men byrjanin var alt annað enn løtt. Vit máttu ringja niður, hvørja ferð ein kundi spurdi um eina ferð. So ringdu vit aftur til kundan, og um hann ikki var heilt nøgdur, máttu vit aftur ringja niður.

- Telefonrokningin varð sera høg og vit høvdu ongar pengar, greiðir Ásla frá. – So hvønn mánað mátti eg kempa fyri at skava pengar saman til telefonrokningina. Eg veit ikki, hvussu ofta telefonin varð slitin, men tað eydnaðist altíð at fáa nokk pengar til at fáa sambandið aftur.

Tey fyrstu mongu árini helt Ásla Fonn skil á allari søluni við bók og blýanti. Slitnu bøkurnar vitna um Áslusa røkinskap, men eisini um hvussu lítið tey seldu fyrstu tíðina.

- Vit seldu ikki nógv og vinningurin var ómetaliga lítil, sigur Ásla. Vit arbeiddu bæði ølønt tey fyrstu árini. Døttirin gekk á læraraskúla í Havn og livdi av studninginum, meðan sonurin og mamma mín búðu heima hjá okkum. Heilt erligt, so veit eg ikki,

Sosialurin